## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hvassur vindur ella skrið av suðri og útsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin upp í hvassan vind av vestri og ælingur, men seinnapartin minni vindur av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av vestri, týsdagin hækkar hann upp í norðan. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 3 og 7 stig.

# Listaverkini tala saman

**Fyri fjórðu ferð verður Heystframsýning í Listahøllini á Skipasmiðjuni. Í ár eru 16 av førandi føroysku listafólkunum við á framsýningin, sum vísir, hvussu fjølbroyttur føroyski listapallurin er**

LIST
*Tíðindaskriv*

Heystframsýningin er ein bólkaframsýning, har eldsálir átaka sær leiklutin at flyta føryska listalívið fram á leið. Listafólkini hava sjálvi lagt framsýningina til rættis og vilja á tann hátt í felag geva sítt listaliga ískoyti til føroyska listpallin og vísa tað fjølbroytni, sum bert ber til á eini bólkaframsýning.

Tó hevur Heystframsýningin megnað tað, sum nógvar aðrar bólkaframsýningar ikki hava, nevnliga at fáa listaverk at tala saman.

Ein bólkaframsýning vísir verk hjá einarum, hjá listafólkum, sum ikki hava somu listaáskoðan, sum yvirhøvur ikki brúka sama úttrykk og sum vilja nakað heilt ymiskt við síni list.

Soleiðis verður Heystframsýningin 2008 eisini, men júst henda framsýningin vísir, at listafólkini megnað at skapa ein heild og fáa listaverkini at tala saman. Til ber at hyggja eftir tí einstaka verkinum, sum eitt sjálvstøðugt verk, men samstundis veksur eitt samspæl millum øll verkini, sum gevur nýggjar møguleikar.

Umframt at Heystframsýningin vísir verk av nøkrum av landsins størstu listafólkum, so er eisini høvi at sígga og lurta eftir spennandi samrøðum millum verkini. Júst hetta ger Heystframsýningina til eina av fremstu listarligu hendingum í listakalendaranum.

Heystframsýningin 2008 er bæði í Norðurlandahúsinum og í Listahøllini á Skipasmiðjuni, sum nú eitur MEST. Framsýningin í Listahøllini letur upp leygardagin 27. september kl. 15 og er opin hvønn dag millum kl. 15 og 18 til 19. oktober.

Framsýningin í Norðurlandahúsinum letur upp sunnudagin 28. september kl. 16. Í tí sambandi hava limir úr Aldubáruni konsert.



*Tey 16 listafólkini á framsýningini eru í ár: Zacharias Heinesen, Tróndur Patursson, Hansina Iversen, Rannvá Kunoy, Torbjørn Olsen, Marius Olsen, Bárður Jákupsson, Olivur við Neyst, Andrias Andreassen, Anker Mortensen, Bjarne Werner Sørensen, Tummas Jákup Thomsen og Hjördis Haack og Hanni Bjatalíð, sum eigur hetta verkið. Hartil verða Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir og Brandur Patursson við sum gestaframsýnarar*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -1 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -- |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 20 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | -- |
| New Dehli | -- |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 30 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1009 hPa. við Scoresbysund fer norðureftir og dýpist. Kuldabrúgvin haðani til havið vestan fyri Føroyar fer eystureftir.



**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Atlantshavinum á 55N-31V fer móti Íslandi og dýpist. Hitabrúgvin haðani til havið sunnan fyri Føroyar fer norðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/08 kl. 06[00] – 10/09 06[00]. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í september: 0,4° - Mesti hiti máldur í september: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 09/08 kl. 06[00] – 10/09 06[00].
Avfallið higartil í september: 43 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

Alt um harmonikur



www.simme.eu

Lesið
Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 20. september | Mánin næstur jørðini |
| 22. september | Seinna kvarter |
| 29. september | Tendring |
| 5. oktober | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. sept | 4:12 | 16:37 | 3:12 | 15:37 | 3:27 | 15:52 | 6:12 | 18:37 | 7:12 | 19:37 | 2:27 | 14:52 | 1:27 | 13:52 | 4:27 | 16:52 | 5:27 | 17:52 | 3:57 | 16:22 | 5:12 | 17:37 |
| 26. sept | 5:00 | 17:24 | 4:00 | 16:24 | 4:15 | 16:39 | 7:00 | 19:24 | 8:00 | 20:24 | 3:15 | 15:39 | 2:15 | 14:39 | 5:15 | 17:39 | 6:15 | 18:39 | 4:45 | 17:09 | 6:00 | 18:24 |
| 27. sept | 5:45 | 18:07 | 4:45 | 17:07 | 5:00 | 17:22 | 7:45 | 20:07 | 8:45 | 21:07 | 4:00 | 16:22 | 3:00 | 15:22 | 6:00 | 18:22 | 7:00 | 19:22 | 5:30 | 17:52 | 6:45 | 19:07 |
| 28. sept | 6:28 | 18:49 | 5:28 | 17:49 | 5:43 | 18:04 | 8:28 | 20:49 | 9:28 | 21:49 | 4:43 | 17:04 | 3:43 | 16:04 | 6:43 | 19:04 | 7:43 | 20:04 | 6:13 | 18:34 | 7:28 | 19:49 |